Fekk høvuðsvinning í konfirmatiónsgávu

13 ára gomul sandavágsgenta vann høvuðsvinningin í V4, sum var 10.000,- krónur, í somu viku, hon var konfirmerað

VINNINGUR
Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Sandavágur: 13. ára gamal Jórun Myllhamar í Sandavági vann høvuðsvinningin í páskadráttinum hjá V4 beint eftir, at hon var konfirmerað.

Jórun Myllhamra vaað konfirmerað sunnudagin undan dráttinum, so hon heldur, at hetta mundi vera tann størsta konfirmatiónsgávan, hon fekk.

Hon var við pápa sínum eini ørindi í Miðvági, tá hann bað hana fara inn í Mylluna at keypa sær ein V4 seðil.

– Eg gjørdi av, meðan eg stóð har, at keypa tveir seðlar. Annan skuldi eg hava sjálv, greiðir Jórun frá. Men eg gjørdi ikki av, hvør skuldi hava hvønn.

Komin út aftur í bilin, bað hon pápan taka sær annan seðilin. Hin skuldi hon hava sjálv.

– Hann tók, og eg vann, flennir tann sera fegni, ungi vinnarin úr Sandavági.

Hon sigur, at hon hevur ikki gjørt av, hvat hon fer at gera við allar pengarnar, hon vann. Men fartelefonin hjá henni er í ólagi, og hon heldur, at hon fer at keypa sær eina nýggja. Eisini ætlar hon sær at fara ein túr til Danmarkar at vitja systir sína, sum býr har. So hesin vinningurin er eitt gott ískoyti til tað, sigur tann fegna13 ára gamla Jórun Myllhamar.

13 ára gamla Jórun Myllhamar í Sandavági vann høvuðsvinningin í páskadráttinum hjá V4 í somu viku, sum hon varð konfirmerað

Mynd: Edvard Joensen

Illgruni um ILA á Sørvágsfirði

Aftur einaferð er illgruni um, at ILA er komið í aliringarnar hjá Sørvágs Laksi á Sørvágsfirði. Talan er um ein ring, sum liggur fyri Tøðkletti. Tað er har, teir ytru ringarnir á myndini liggja

Mydn: Edvard Joensen

Royndir hava aftur víst tekin um ILA í alibrúkinum hjá Sørvágs Laksi. Endalig staðfesting var ikki komin, tá vit tosaðu við eigaran mánamorgunin

ALIVINNA
Edvard Joensen
edvard@sosialurin.fo

Sørvágur: Illgruni er um, at ILA sjúkan er komin í alibrúkið hjá Sørvágs Laksi á Sørvágsfirði. Endalig staðfesting var ikki komin mánamorgunin.

Tað hevur fyrr verið víst á ILA smittu í alibrúkinum Sørvágs Laksi. Men ta ferðina varð talan um falskan alarm. Eitthvørt mistak var gjørt í eini starvsstovu, og staðfest varð seinni, at eingin sjúka var kortini.

Men nú eru ávaråingarlúðrarnir aftur farnir at ljóða á Sørvágsfirði. Tí nú hava royndir aftur víst á, at ILA møguliga er í ringunum.

Gardar Joensen, stjóri á Sørvágs Laksi, váttar, at illgrunin er har. Men tá Sosialurin tosaði við hann, var endaligt svar ikki komið.

– Men hesaferð vænti eg kortini, at tað verður staðfest, sigur Gardar Joensen. Eg vænti ikki, at vit eru so heppin, at sama mistak verður gjørt tvær ferðir, soleiðis at vit eisini hesaferð sleppa undan.

Talan er um royndir í einum ringi í ytra brúkinum við Biggjarlandið. Teir ringarnar, sum liggja fyri Tøðkletti beint heimanfyri Biggjar bygd. Í ringunum, sum liggja fyri Breiðá longri inni á firðinum, er einki ávíst enn. Men Garda Joensen sigur, at tað er so stutt millum ringarnar allar, at sannlíki tíverri man vera fyri, at er smitta í einum, breiðir hon seg til allar ringarnar.

Sørvágs Laks eigur eisini ringar hinumegin fjørðin. Teir liggja á Selvík Men har er eingin fiskur í.

Farið er longu undir at tøma tann ringin, har illgruni er um, at smitta er í, sigur stjórin á alibrúkinum. Hann sigur, at tann ringurin verður helst tómur til páskar.

Síðan verður hidlið fram, og sum útlitini eru í løtini, verður helst neyðugt at taka alt, sum gongur í ringunum á Sørvágsfirði. Tað fer at taka einar tveir mánar ella so, væntar Gardar Joensen.

Hann sigur, at tað er sjálvandi keðiligt, at soleiðis er, men nøkur beinleiðis vanlukka er tað kortini neyvan.

– Munurin er ikki so ovurhonds stórur á hesum og á kunngerðini frá ES, sum sigur, at økini skulu liggja still í tveir mánar millum tøkurnar. Í slíkum førum, tá sjúka er uppií, tala vit um eitt hálvt ár, sigur Gardar Joensen.

Alt, sum er í ringunum á Sørvágsfirði, er fiskur í tøkustødd, so hann kann allur takast til sølu. Tó sigur stjórin, at tað seinasta kanska verður ikki heilt fullvaksið, áðrenn takast skal.

Barnakórstevna í Sørvági

Herfyri var stór barnakórstevna hildin í Sørvági. Umleið hálvttriðjahundrað børn úr meginpartinum av landinum luttóku

BARNAKÓR

Næstseinasta vikuskifti savnaðust umleið hálvttriðjahundrað skúlabørn úr størum parti av landinum til sangstevnu í Sørvags Skúla.

Børnini, sum vóru úr teimum eldru flokkunum í grundskúlanum, komu saman við lærarum til Sørvágs.

Tiltakið vardi allan dagin, og sungu tey saman sangir burtur úr bókini Loppugras, sum Sólrun Michelsen hevur gjørt. Pauli Hansen hevur gjørt løg til sangirnar, sum eisini eru givnir út á fløgu.

Joanna Johansen var kórleiðari í Sørvági hendan dagin, og tónaskaldið var eisini til staðar.

Seinnapartin var konsert, har sangirnir, børnini høvdu vant um dagin, vórðu sungnir.

ej

Børn úr meginpartinum av landinum vóru í Sørvági hendan dagin

Mynd: Álvur Haraldsen

Nógv fiskaarbeiði á Sandoy Seafood

Trolararnir, Nornagestur og Kolumbus og Eysturbúvin og Vesturbúgvin, hava gjørt stórar túrar í seinastuni. Hjá útróðrinum hevur vignast minni væl

Partrolararnir, Nornagestur og Kolumbus, landaðu 220.000-240.000 pund á Sandi mánadagin, og í síðstu viku landaði Eysturbúgvin 240.000 pund. Enn hevur tó lítil várróður verið at tosað um

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Enn hevur eingin snelluútróður tikið seg upp hjá bátunum á Sandi, hóast bátar, sum royndu vestari á, herfyri høvdu onkran góðan dag.

Vanligt er um várarnar, at snellufiskurin tekur seg upp norðanfyri, og tá ið ein tíð er umliðin, plaga bátar vestanfyri og sunnanfyri eisini at fáa væl av fiski.

Á Sandi lata teir illa at veðurlagnum, sum hevur verið óstøðugt, og tí hevur lítil roynd verið.

Nógvur trolfiskur

Hevur lítil útróður verið, hava trolararnir, sum leggja veiðina upp á Sandi, fingið nógvan fisk í seinastuni.

Mánamorgunin byrjaðu teir at landa partrolararnar, Nornagest og Kolumbus, sum høvdu eini 220.000-240.000 pund av fiski. Ein stórur partur av veiðini var upsi, men skipini høvdu eisini fitt av hýsu.

Á Sandoy Seafood siga tey, at upsin er rættiliga smáur, og tað nógva av veiðini er upsi 3 og 4.

- 1'arar og 2'arar síggjast næstan ikki uppí veiðini, og helst er tað so, at størstu nøgdirnar eru av 4'arum.

Hendan vikan er stutt, tí hósdagurin og fríggjadagurin eru heilidagar. Men á Sandoy Seafood vænta tey kortini at verða líðug við fiskin hjá Nornagesti og Kolumbusi fyri halguna.

Eysturbúgvin landaði

Á Sandoy Seafood høvdu tey eisini nóg mikið at gera í síðstu viku. Umframt veiðina hjá Eysturbúgvanum, sum vá eini 240.000 pund, keypti felagið fisk á uppboðssølu og frá Beta. Haraftrat keypti Sandoy Seafood eisini nakað av útróðrarfiski.

- Jú, her hevur bara verið heilt fitt at gera í vár, siga tey á Sandoy Seafood.

Í seinastuni hevur tó heldur meira verið at gjørt á Sandi, har fiskurin verður saltaður enn í Skopun, har flakaframleiðslan er.

Línuskipini aftur av túri

Higartil í ár hevur Kósin tikið ímóti heldur meira fiski enn somu tíð í fjør. Nøgdirnar av hýsu eru eisini størri í ár enn seinasta ár

Jákup B og Núpur hava landað á Kósini, Kvikk hevur selt um uppboðssøluna, og Polarstjørnan og Klakkur hava selt í Skotlandi

FISKIVINNA
Vilmund Jacobsen
vilmund@sosialurin.fo

Línuskipini, Jákup B og Núpur, landaðu á Kósini mánadagin. Jákup B hevði eini 140.000 pund, harav tveir triðingar var toskur og ein triðingur hýsa. Núpur hevði 80.000 pund, og hjá teimum býtti veiðan seg umleið í helt millum tosk og hýsu.

Á Kósina siga tey, at hýsan er smáttfallandi.

Hini skipini

Línuskipið, Kvikk, seldi um uppboðssøluna mánamorgunin. Teir høvdu stívliga 80.000 pund, harav 25.000 pund var hýsa og ein stórur partur av restini toskur. Kósin keypti ein part av veiðini hjá Kvikki.

Klakkur og Polarstjørnan selja í Skotlandi hendan túrin, men vit vita ikki, hvussu nógv teir høvdu inni.

Á Kósini ætla tey ikki at keypa meira fisk hesa vikuna, tí vikan er so stutt.

- Umframt veiðina hjá Jákupi B og Núpi, hava vit keypt 50.000 pund á uppboðssøluni. So, vit hava nóg mikið av fiski til teir tríggjar arbeiðsdagarnar í vikuni, siga tey á Kósini.

Somu nøgd

Higartil í ár hevur Kósin tikið ímóti heldur størri ráfiskanøgdum í ár enn somu tíð síðsta ár. Talan er um eina øking uppá eini 10 tons.

Á Kósini siga tey, at ein broyting í samansetingini av ráfiskinum er, at nøgdirnar av hýsu eru størri í ár enn somu tíð í fjør.